# SPYRST SO LIVST

## RIGMOR DAM

Tríbarnamamma, kona, lærari, journalistur og redaktørur á lívsstílsblaðnum *Rákið* svarar spurningum til brævkassan **SPYRST SO LIVST**



*Redaktiónin loyvir sær at velja og vraka millum innsendu spurningarnar*

Hevur tú brúk fyri einum góðum ráði, so send spurningin til:
**Sosialurin**
**SPYRST SO LIVST**
**postboks 76**
**FO-100 Tórshavn**
**ella teldupost til rigmor@sosialurin.fo**

## Tómur bindiklubbur

**Góða Rigmor**

*Eg havi í nógv ár verið í einum bindiklubbi, sum eg havi verið glað fyri. Men seinastu tíðina er tað sum um, at eg ikki hoyri til har longur. Fyri nøkrum árum síðani fór eg undir útbúgving og hetta hevur sjálvandi broytt og ment meg nógv. Samstundis kenni eg tað sum um, at hinar, sum eg havi kent frá barnsbeini, hava »staðið í stað«. Knappliga sigur tað mær slett onki at tosa um tað, sum vit altíð hava gjørt, so sum barnauppaling, føðslar, innrætting, handarbeiði, parlag og sjálvandi eitt sindur av slatri eisini. Eg kenni meg tóma og kedda, tá eg komi heim, tí eg eri góð við vinkonurnar í bindiklubbanum og ynski ikki at missa tær. Men eg kundi hugsað mær, at vit tosaðu um okkurt, sum hevði eitt lítið sindur meira upp á seg, til dømis politikk, vinnulív, etik, bøkur og annað, sum stingur eitt sindur djúpari. Men eg veit, at tær tíma ikki at tosa um slíkt. Hvat heldur tú, at eg skal gera?*

***Heilsan hin ørkymlaða***

**Góða ørkymlaða**

Tað er vanligt, at fólk, sum taka eina bókliga útbúgving, brádliga kenna seg fremmandagjørd í heimliga umhvørvinum, um útbúgving ikki er so vanlig har. Hetta krevur nakað serligt av báðum pørtum, sum í veruleikanum ongantíð fara at skilja hvønn til fulnar aftur. Men harvið er ikki sagt, at kærleikin er burtur. Sum tú sjálv sigur, so tíma vinkonurnar ikki at tosa um tað, sum tú kundi hugsað tær. Men tú vilt heldur ikki missa tær. Eg haldi, at tú skalt halda fram í bindiklubbanum sum higartil, men royna at góðtaka vinkonurnar, sum tær eru, uttan at vænta meira av teimum, enn tær kunnu bjóða. Tað er tú, sum hevur valt at »fara víðari«, og tað skulu tær ikki svíða fyri.

Um somu tíð er eisini umráðandi, at tú roynir at byggja tær eitt annað netverk, sum kann nøkta tørvin á tí, sum tú rópar djúpari evnum. Til dømis í einum lesiringi, politiskum felagsskapi, kvinnufelag, kvøldskúla ella í einum fakligum netverki. Hav antennurnar úti og bjóða fólki, sum tær líkar, inn í títt lív.

Góða eydnu við netverkinum

***v. rigmor***

## Omma og abbi við yvirskoti

**Hey Rigmor**

*Vit eru eitt par í 60'unum við nógvari tíð og yvirskoti. Børnini og ommubørnini búgva uttanlands, so tey fáa tíverri lítla gleði av okkum í gerandisdegnum. Men kanska onkur onnur barnafamilja kundi hugsast at vilja hava eitt eyka sett av ommu og abba? Vit búgva tætt við ein dagstovn og síggja hvønn dag foreldur avlevera børnini tíðliga á morgni og koma eftir teimum seint seinnapart. Tey virka so troytt og strongd, og vit ímynda okkum, at børnini høvdu havt gott av at verið heintað tíðliga onkrar dagar, og bara verið saman við ommu og abba í frið og náðum í nakrar tímar.*

***Vinaliga omman og abbin***

**Góðu omman og abbin**

Seinastu árini eru nógvar ungar familjur fluttar til meginøkið, har tær hava ikki sama netverkið, sum í heimbygdini. Tær eru nógv einsamallar og børnini hava lítið samband aðrar familjulimir enn foreldrini.

Í grannalondum okkara er tað vanligt við eyka ommum og abbum, sum kunnu taka eina hond við, tá tørvur er á tí. Tað almenna umsitur skipanir, har til ber at søkja um »reserve-bedste«. Tað ber eisini til at finna saman privat til dømis við at seta eina lýsing í bløðini.

Fyri mítt egna viðkomandi hevði eg verið tryggari, um formiðlingin fór fram umvegis Almannastovuna ella Barnaverndarstovuna, sum kundi tryggjað, at viðurskiftini heima hjá ommuni/abbanum vóru í lagi. At koma í samband við hesar stovnar nýtist ikki at merkja, at ein er »sosialur tapari«.

Ongin ivi er um, at nógv børn kunnu fáa gagn av eyka ommu/abba, sum hava tíð og orku at vera um tey: at heinta tíðliga onkrar dagar, ganga ein túr, práta saman, fáa ein drekkamunn, fara á bókasavnið, fortelja søgur og annað, sum foreldrini ikki hava yvirskot til í einum hektiskum gerandisdegi.

Eisini kundi ein slík skipan bøtt um trivnaðin hjá foreldrunum, um børnini av og á kundu verið ansað, so foreldrini fingu tíð til hvørt annað.

Ein win win situation fyri allar partar.

***v. rigmor***

## Lærarahapping í fleiri ættarlið

**Hey Rigmor**

*Vit eru eitt foreldrapar, sum hava stórar trupulleikar av einum eldri lærara í flokkinum, har 12 ára gamli sonurin gongur. Í seinastuni er hann vorðin rættiliga stillur, nervøsur og innisælur. Hann kemur heim úr skúla hvønn dag, og vil helst vera saman við okkum, ommu og abba sínum ella systkjunum. Vit vita, at børnini í flokkinum eru góð við hann, og higartil hava vit ikki skilt, hví hann ikki trívist so væl. Nú eru vit komin fram á, at hesin eini lærarin hevur fragd av at arga og pressa drongin, til dømis við at noyða hann at lesa hart, hóast hann ikki torir. Hetta vita vit frá øðrum børnum í flokkinum, sum hava ilt av tí. Og nú hevur sonurin eisini váttað, at lærarin er ein pláguond. Vit kenna læraran frá egnari skúlatíð og vita, at hann kann vera eitt øgiligt beist øll árini. Hann er eisini javnan samrøðuevni millum fólk. Tað hava vit tó ikki fortalt soninum. Nú er spurningurin bara, hvat vit skulu gera fyri at steðga læraranum, sum í fleiri ættarlið hevur forpestað skúlagongdini hjá børnum her á staðnum.*

***Heilsan Joensens***

**Góðu tit**

Tá eg lesi tykkara bræv, hugsi eg um Pelle Erobreren hjá Martin Andersen Nexø, har pápin lovar soninum, at hann skal smyrja dreingirnir av, sum arga Pelle. Men tá samanum kemur torir hann ikki, og fer krúpandi sum ein hundur undan argapisunum. Og Pelle verður so vónbrotin av pápanum, sum ikki stóð upp fyri sær, tá tað galt.

Tað ljóðar ikki, sum um, at nakar stóð upp fyri tykkum, tá tit vóru børn. Tí vita tit kanska heldur ikki, hvussu týdningarmikið tað er at standa upp fyri børnunum, tá tey eru fyri órætti. Eru tit sannførd um, at hesin lærarin er trupulleikin, skulu tit innkallað skúlaleiðsluna til fund, har tit og lærarin eisini eru til staðar. Og tit skulu gera tað púra greitt, at tit ikki góðtaka, at lærarin plágar sonin í skúlanum. Hjálpir tað ikki, mugu tit venda tykkum til landsmyndugleikarnar, sum so mugu taka málið upp saman við skúlaleiðsluni.

***v. rigmor***

---

Málstrikan MÁLFELAGIÐ

# Nær er **'yvirtaka'** blivið óføroyskt?

– Soleiðis ljóðar ein fyrispurningur til Máltænastuna. Spurt verður, hví og nær tað er blivið 'føroyskari' at siga 'taka yvir' enn 'yvirtaka'. Talan var um, at onkur kommuna skuldi »taka yvir« onkran skúla.

Hetta er torført at svara upp á, tí føroysk málstýring fungerar í tí fjalda, í loyndum. Onkur málstýrari hevur funnið út av, at vit ikki eiga at gera eitt ávíst slag av samansettum sagnorðum. Vit skulu t.d. ikki siga 'útbúgva', bara 'búgva út'. Tað sama er við 'útgeva' og líknandi orðum. Men málið er ikki mekanikkur. Tað er púra natúrligt føroyskt at siga, at »tingformaðurin mátti *útseta* málið til næsta dag«. Hevði hann her sagt 'seta út', so hevði hann tosað sum útlendingur ella havt okkurt heilt annað í tonkunum: 'seta út' í týdninginum 'seta óynskt barn út' – t.e. beina fyri tí. Og sleppa okkara skiparar ikki longur at *seta út* í kortið, so mugu vit siga, at mark má vera fyri, hvat málfútar loyva sær at *útseta* okkum fyri.

Av tí at tað ikki ber til at spyrja ta loyniligu málstjórnina, mugu vit gita. Orsøkin til, at 'yvirtaka' verður vrakað kann vera tann, at 'yvirtaka' líkist tí danska 'overtage' (týskt: übernehmen). Lesarin undrast kanska, men so einføld er »føroysk málrøkt«.

Nógv onnur dømir kunnu nevnast. Tað er ikki tað sama 'at avtaka' og 'taka av'. Samansetingarnar eru eisini ríkandi fyri málið. Øll vita, hvat tað er at 'kenna til' (alkoholiskt), men siga vit, at hann tilkendi onkrum okkurt, so eru vit hjá einari juridiskari nuancu: dómari dømdi einum persóni okkurt til. Soleiðis kundu vit fortsett í tað óendaliga við dømum um málsins ríkidømi av snildisliga samansettum sagnorðum, men einki bítur á teimum, sum hava *yvirtikið* málið, og journalisturin og lærarin eru ofta í teirri syndarligu støðu, at teir *geva yvir skarvin.*

(MT)